# Krokodille i treet

Rithøvundur og myndprýðari: Ragnar Aalbu (NO)
Cappelen Damm, 2015

Tilnevnd barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2016

Søgugongd: Ein krokodilla fer inn í skógin, har krokodillur ikki plaga at vera. Krokodillan heldur, at ein úlvur kemur, og klintrar upp í eitt træ fyri at sleppa sær úr vanda. Úr trænum er gott útsýni, men truplari er at klintra niður enn upp. Krokodillan má finna eina loysn.

Evni: At uppliva okkurt nýtt, forvitni, at koma sær úr eini truplari støðu, sjálvbjargni, fremmandgering, ymiskar mentanir og umhvørvi




## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES saman við teimum yngstu

**Hyggið at myndunum saman. Hvar er krokodillan? Hvat ger krokodillan? Finna tit onnur djór? Tekna eitt træ og eina krokodillu. Duga tit nakran sang um krokodillur?**

### TEY YNGRU

**1. Veitst tú nakað um krokodillur? Hvar halda tær til? Hvussu síggja tær út?**
**Mála ella tekna tína egnu krokodillu.**

**2. Les heitið á bókini og hygg at kápumyndini. Hvat heldur tú, bókin snýr seg um?**

**3. Hví er krokodillan í einum træi? Hevur tú roynt at klintra í einum træi? Hvussu kennist tað at vera høgt uppi? Hvussu slapst tú niður aftur?**

**4. Krokodillan dettur niður, men lendir á onkrum bleytum og brúnum. Hvat man tað vera? Hygg væl at myndunum.**

### MIÐLINGAR

**1. Hvat heldur tú um søguna? Hví fer krokodillan fara einsamøll í skógin, tá ið tað er tryggari at vera heima?**

**2. Hygg at myndini á kápumyndini. Hvørjar litir sært tú? Hvørji skap? Tekna eitt træ og eina krokodillu við at nýta skapini runding, fýrakant og tríkant.**

**3. Hvat heldur tú um søguna? Hví klintrar krokodillan longri upp í træið? Fuglurin fær óvæntaða vitjan, krokodillan klintrar heilt upp í træið. Hvat hevði tú gjørt, um ein krokodilla kom at vitja teg?**

**4. Krokodilluni dámar at fara túr einsamøll, helst tá ið mjørki er.**
**Dámar tær at gera okkurt fyri teg sjálvan? Sig frá.**

**5. Lítla krokodillan verður bangin, tá ið hon heldur seg síggja ein úlv. Ræðist tú nakað djór?**



## TEY STØRRU BØRNINI

1. Hvat dámdi tær við bókini? Hvat dámdi tær ikki? Var nakað, ið tóktist trupult? Kennir tú nakað aftur úr øðrum søgum?

2. Um tú skuldi farið onkustaðni, tú ikki hevurverið-fyrr, hvar skuldi tað so verið? Hvathevði tú ynskthendi har?

3. Á síðstu síðu er ein mynd av einari gentu í reyðum klæðum. Hví heldur tú, at rithøvundurin hevur tikið hana við? Hvat heldur tú hendir aftaná? Skriva eitt framhald.

4. Ímynda tær, at eitt høgt træ stendur tætt við, har tú býrt, og at tú klintrar heilt upp í træið. Lýs útsýnið og tekna tað, tú sært.

---

**LES EISINI:**

*Det var ikke en busk* eftir Eli Hovdenak (Noreg)

*Træið* eftir Bárð Oskarsson (Føroyar)

---

MÁLBITIN

# "Krokodilla"

| | |
|---|---|
| svenkt | Krokodil |
| danskt | Krokodille |
| norskt | Krokodille |
| íslendskt | Krókódíll |
| føroyskt | Krokodilla |
| grønlendskt | Kuukkooriarsuaq |
| finskt | Krokotiili |
| norðursamiskt | Krokodiila |

Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við **#nordiskabokslukaren**!